Sjálvstýrisflokkurin

GLEÐILIG JÓL

# STIG FYRI STIG



**HEÐIN D. POULSEN**
HEDIN@HEDINDP.COM | TEL 28 00 78



**KÁRI Á RÓGVI**
KARI_LAW@POST.OLIVANT.FO | TEL 58 55 16

## Á LØGTINGSVALINUM 19. JANUAR STILLA VIT UPP FYRI SJÁLVSTÝRISFLOKKIN

Vit fara komandi valskeið at taka týðandi stig á sjálvstýris- og framburðsleið.

Vit tora annað enn at bora – og vilja gera íløgur í mentunarliga undirstøðukervið.

Vit vita, at vit mugu skapa vælferð fyri at kunna býta vælferð. Tí vilja vit hava skúlar og stovnar fyrst, síðani taka vit tunnlar og brýr.

Vit skapa vøkstur við at leggja doyðin á einskiljing, íverksetan og javnstøðu.

Vit vilja tvífalda talið av lestarplássum í Føroyum; allar vanligar hægri útbúgvingar, handaligar, fakligar sum bókligar skulu kunna takast í Føroyum.

Vit vilja fleirfalda játtan til granskingar og gera neyðugu íløgurnar í bókasøvn og hjálparamboð at fáa skúlaskipan okkara í heimsklassa.

Vit vilja umskipa skattabyrðuna, so minni verður tikið í skatti av lønum, og so botnskattir sum kringvarpsgjald og sjúkrakassagjald verða avtiknir. Heldur skulu vit skatta vinningin av at selja tilfeingisrættindi og gevast við goymdum stuðulskipanum til seráhugamál í skattalóggávuni.

Vit vilja umskipa almenna raksturin, selja ella likvidera búnaðargrunn, húsalánsgrunn, real, flogvøll og aðrar almennar vinnuligar ognir. Heldur vilja vit gjalda almennu skuldina, byggja skúlar og stovnar.

Vit vilja hava ungdómin heim aftur, gera tað spennandi og liviligt hjá lesandi, einligum foreldrum, fólki ið bera brek og fólki við serligum tørvi og øllum skapandi kreftum.

Vit fara at rudda upp í dungunum av avoldaðum lógum og reglum. Vit fara at bora í almenna bygnaðinum og geva fyrisitingini tað mótspæl, hon hevur uppiborðið.

Vit fara at bjóða útlendingum vælkomnum til skipaði viðurskifti í Føroyum.

... og gera Føroyar spennandi, so okkurt verður at fara til, tá ið vit koma burturúraftur tunnlinum.

**VELJIÐ SJÁLVSTÝRI!**

WWW.SJALVSTYRI.FO